# Úr at gera við kaving

Fuglfirðingurin, Janus Joensen, undirvísir dagliga á trygdarmiðstøðini í Klaksvík, har hann er lærari. Við síðuna av læraraarbeiðnum hevur hann tó eitt heldur øðrvísi arbeiði, sum ikki so nógv í Føroyum gera. Janus er nevniliga útbúgvin PADI-Open Water Scuba Instructor og Medic First Aid Instructor, og hann hevur høvuðsábyrgdina av teimum skeiðum, sum Faroe Dive skipar fyri.

Faroe Dive bleiv sett á stovn á heysti 2002. Ætlanin við virkinum er at bjóða øllum áhugum møguleikan at uppliva heimin undir vatnskorpuni.

Faroe Dive bjóðar kundunum fleiri ymiskar kavaraútbúgvingar. Útbúgvingarnar fevna um alt frá einum royndartúri til eina útbúgving sum kavaraleiðari, so møguleikarnir hjá kundunum eru nógvir.

Janus er ein av teimum fáu í Føroyum, sum undirvísir í kaving, og hann letur væl at arbeiðnum.

- Ja, hetta dámar mær væl. Eg kavi nógv við síðuna av arbeiðnum hjá mær, og eg havi úr at gera. Serliga útlendingar eru áhugaðir í hesum, og í fjør hevði eg vitjan av á leið 70 útlendingum, sigur Janus.

Faroe Dive hevur skrivstovu í Klaksvík, og tað er eisini her, tær flestu útbúgvingarnar verða hildnar. Faroe Dive hevur tó møguleika at undirvísa kring alt landið, har sum umstøðurnar eru nóg góðar.





















